VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum

# Talgreining og kjak



*Tað var Bjarni Poulsen, ið starvast hjá Grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe, sum hevði framløgurnar*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Sum heild gongur verri hjá fiskiskipaflotanum í løtuni, og gongdin er hin saman hjá fiskavirkisvinnuni. Hetta er høvuðsorsøkin til, at støðuga framgongdin í búskapinum seinastu árini nú er vend til afturgongd**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fundi herfyri legði Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe fram eina sonevnda roknskapargreining av fiskiflotanum og fiskavirkjunum fyri árini 1999 til 2003.

Niðurstøðan er, at fiskiflotin hevur havt nøkur góð ár, harav árið 2001 var hitt besta, og síðan hevur gingið minni væl hjá meginpartinum av flotanum.

Í fiskavirkisvinnuni gongur heldur ikki ov væl í løtuni, og væntandi er, at fiskavirkini tilsamans fara at hava eitt undirskot í ár, sum fer at liggja um einar 30 miljónir krónur.

Greiningin byggir í fyrsta lagi á almennu roknskapirnar hjá feløgunum, sum reka skip og virkir.

Grannskoðarafelagið sigur, at tey við greiningini hava lagt dent á at geva teimum, sum lesa frágreiðingarnar, møguleika fyri at gera sínar egnu niðurstøður.

Taltilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymiskar hættir. Tó kann staðfesta, at sera stórar broytingar eru farnar fram í tíðini frá 1999 til 2003.

Fiskiflotin havt eina støðuga framgongd frá 1999 til 2001, men árini 2002 og serliga 2003 hevur gingið afturá. Hetta er eina mest orsøkin til, at støðuga framgongdin í búskapinum er vend til eina afturgongd.

Greiningin fevnir ikki um 2004, men týðiligar ábendingar um, at hetta árið er verri enn 2003 hjá mongum skipum og virkjum.

Eftir at Bjarni Poulsen hevði kunnað um gongdina hjá fiskiskipaflotanum og í stuttum eisini um gongdina hjá fiskavirkjunum, varð prátað ella kjakast aftur um fram um ymisk viðurskifti í vinnuni – á sjógvi og landi.

Í greinini á hesum báðum síðunum fara vit at endurgeva ein part av tí, sum var frami í hesum annars spakføra kjaki.

# Gomul skip og gomu



**Kann upsi virkast umborð heldur enn í landi? Eru vit afturútsigldir í søluøkinum? Loysir tað seg at skilja fiskin fyri útboð? Skulu skip og virkir tvinnast saman aftur? Hetta vóru nakrir av spurningunum, sum vóru uppi og vendu í spakførum kjaki á fundi, sum Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe skipaði fyri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fundi í hølum hjá Grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe herfyri, tá ið felagið legði fram eina sonevnda roknskapargreining yvir støðuna hjá føroyska fiskiflotanum og fiskavirkjunum árini 1999-2003, var í endanum av fundinum nakað av práti ella kjaki um ymisk viðurskifti í vinnuni.

Greiningin hjá Rasmussen & Weihe byggir í fyrsta lagi á almennu roknskapirnar hjá reiðaríunum, sum eiga skipini og á roknskapir hjá virkjunum, sum eru við í greiningini.

Tølini hjá grannskoðarafelagnum vísa, at árini 2001 og 2002 helst hava verið millum tey allarbestu hjá føroyskari fiskivinnu nakrantíð. Fáur hevur sæð betri tíðir í Føroyum, enn hesi árini vóru.

## Eingin samantvinning

Á fundinum eftir framløgurnar kom prátið inn á møguliga samantvinning millum virkir og skip, nú so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum.

Árini undan kreppuni fyrst í nítiárunum, vóru virkir og skip knýtt tættari at hvørjum øðrum, og hetta var við til at binda niður ta marknaðarskipan, sum vit hava sæð í Føroyum síðan kreppuna.

Á fundinum hjá grannskoðarafelagnum legði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, dent á, at tað ikki má henda aftur, at virkir og skip verða tvinnað saman aftur.

Anfinn Olsen, reiðari, var samdur við Óla og segði, at tað hevur gingið lutfalsliga væl hjá føroyskari fiskivinnu eftir, at skip og virkir vórðu loyst frá hvørjum øðrum.

- Vit hava roynt hitt, segði reiðarin.

Hann helt tó, at virkini kanska kundu havt størri ávirkan á, nær skipini koma inn at landa, um fiskurin skal seljast sum feskur

Á fundinum varð nevnt, at túrararnir hjá føroyskum ísfiskaskipum í miðal eru longri enn túrarnir hjá eitt nú íslendskum skipum.

Anfinn Olsen segði, at fiskurin, sum kemur upp á land í Íslandi, í miðal er einar tríggjar dagar yngri enn fiskurin, sum kemur upp á land í Føroyum.

Olaf Olsen helt, at skipini kundu gjørt uppaftur styttri túrar og harvið komið við feskari fiski, um siglingin ikki fór burtur av fiskidøgunum.

## Óvirkaður fiskur og skiljing

Spurningurin um stóra útflutningin av óvirkaðum fiski og skiljing av øllum fiski, áðrenn hann verður útboðin, var eisini uppi og vendi hendan dagin.

Olaf Olsen segði, at reiðaríini uppliva tað, sum um tað er vantandi kapasitetur á virkjunum, ið er ein høvuðsorsøkin til, at tað er so torført at sleppa av við upsan.

- Tað er meiningsleyst at fara av landinum við fiskinum, um tað ikki loysir seg, og prísirnir skulu vera ógvuliga vánaligir í Føroyum, áðrenn tað loysir seg at fara uttanlands.

Tosað varð eisini um broytingarnar, sum landsstýrið ætlar at skjóta upp við at geva útlendingum lættari atgongd til fiskamarknaðin í Føroyum.

Anfinn Olsen, reiðari, segði, at útlendingar hava atgongd til marknaðin í dag ígjøgnum egin feløg í Føroyum, sum hann tók til.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrinum skal allur fiskur, sum verður boðin út í Føroyum sum frá líður støddarskiljast, áðrenn hann verður boðin út.

Olaf Olsen segði, at prísurin fyri at skilja fiskin kemur ikki aftur í avreiðingarprísinum í Føroyum.

- Okkara royndir eru, at vit fáa ikki tað innaftur í prísi, sum tað kostar at